Tjóðskjalasavnið

# Vegleiðing til avhending av privatum pappírsskjalasøvnum

Hevur ein ætlanir um at avhenda privat skjalasøvn, er týdningarmikið at boða Tjóðskjalasavninum frá ymiskum viðurskiftum viðvíkjandi skjalasavninum. Upplýsingar eru týdningarmiklir í mun til at Tjóðskjalasavnið:

## Um tilfarið

### Uppruni

- Virki/fyritøka
- Felagsskapur
- Áhugafelag
- Privatpersónur
- Annað

### Um privatpersónar

- Nær livdi viðkomandi?
- Hvar búði viðkomandi?
- (Lívs)starv?

### Hvørji tíðarskeið fevnir tilfarið um?

- T.d. frá uml. 1915 - 1940 ella 1990 - 2000?

### Hvar er tilfarið skapt?

**Dømir**

- Lá virkið í Kaldbak?
- Er talan um skjøl, ið eru skapt av einum skyldfólki, ið búði tað mesta av lívi sínum í Sørvági?
- Er talan um gerðabók frá eini lokalari nevnd í einum áhugafelagið, ið fevndi um alt landið?

## Umstøður hjá skjalasavninum

### Hvussu nógv fyllir tilfarið?

T.d. 10 ringbind, 3 stórar flytieskjur ella fyllir tað fimm bókahillar í einum kjallara?

### Hevur tilfarið fingið skaða?

T.d. er tað moðið, fingið vatnskaða, skaðadjór, sopp?

### Er talan um talgilt tilfar?

T.d. tekst- og myndafílur ella dátugrunnar. Er tilfarið á harðdiski, teldufløgu ella á diskettum?

### Er talan um filmar, myndir ella ljóðupptøkur?

Eru video- og/ella kasettubond?
Eru myndir ella ljósmyndir?
Eru fólk á myndunum eyðmerkt ella kunnu tey eyðmerkjast?

V. U. Hammershaimbsgøta 18 - FO-100 Tórshavn - Te-. + 298 340 540 - T-postur: skjalasavn@skjalasavn.fo